FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 9. februar 2022
J. nr.: 22/02082
Viðgjørt: AE

Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-119/2021 frá Páll á Reynatúgvu, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen, um Dalstunnilin

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Nær fer Dalstunilin í gongd aftur?
2. Verður arbeiðsplássið avriggað í løtuni?
3. Hvør er orsøkin til steðgin í arbeiðinum, hóast tøka játtan?
4. Er tað ein politisk avgerð at steðga arbeiðinum?
5. Hvørjar avleiðingar fær steðgurin fyri privatu samstarvsfelagarnar í verkætlanini, tá arbeiðið í Dalstunlinum liggur stilt?

Svar til spurning 1, 2, 3 og 4
Dalstunnilin verður 2,2 kilometrar langur og 8 metrar breiður. Tilhoyrandi vegagerð er 300 metrar. Farið var undir at gera nýggju farleiðina til Dals í novembur 2020, og var arbeitt uttan steðg alt 2021. Tað eru boraðir 680 metrar.

Tað er altíð best at gera eina slíka verkætlan um eina leið. Samanlagt verður tað bíligari og fæst skjótari gagn av íløguni.

Tað er ikki játtan tøk til at arbeiða alt árið 2022, og hevur Landsverk sjálvt valt at steðga arbeiðinum fyribils. Sambært Landsverki, verður arbeiðsplássið ikki riggað av, men liggur stilt til farið verður undir at bora tunnilin seinri í ár.

Undanfarna samgonga setti tunnilstoymið til at gera nýggju farleiðina til Dals. Ætlanin bygdi á at játta 9 mió. kr. um árið. Hetta merkir, at arbeiðast kann bert nakrar mánaðir um árið. Í fjør fann landsstýrimaðurin pening til at arbeiða alt árið. Nú leitar landsstýrismaðurin eftir møguleikum fyri at seta arbeiði í gongd aftur sum skjótast. Men til tað krevst játtan og tí verður kannað um tað er møguligt at finna játtan.

Svar til spurning 5
Landsverk vísir á, at privatu samstarvsfelagarnir kenna játtanarprofilin (hvussu játtanirnar fella yvir ár) og hví arbeiðið liggur stilt.

Landsverk vónar, at samstarvsfelagarnir eru til reiðar, tá arbeiðið við Dalstunnlinum verður tikið upp aftur.

Tinganes, 9. februar 2022

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum